Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 70/2020: Uppskot til løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
(Frítøka fyri uttanlandsinntøku og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar)

Fíggjarmálaráðið er komið eftir, at verandi orðing í § 1, nr. 2 í uppskotinum ikki er nøktandi fyri allar viðkomandi partar, og Fíggjarmálaráðið hevur tí orðað eitt broytingaruppskot til Fíggjarnevndina at nýta í sínum áliti.

Uppskot til orðing:

Í § 1, nr. 2 verður sum 2. pkt. sett:

"Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur við kunngerð."

Viðmerkingar:

Við uppskotinum verður § 1, stk. 9 í eftirlønarlógini strikað.

Við hesum fellur heimildin hjá landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um uttanlandsinntøkur við kunngerð burtur.

Í § 1, nr. 2 í uppskotinum er ásetingin um uttanlandsinntøkur umorðað.

Endamálið við nýggju orðingini er at betra um møguleikarnir fyri at kunnu frítøka persónar, sum arbeiða fyri arbeiðsgevarar við heimstaði uttanlands, og sum rinda til eina eftirlønarskipan uttanlands, frá skylduni eisini at rinda til eina eftirlønarskipan í Føroyum av somu inntøku.

Í § 1, stk. 9 í eftirlønarlógini hevur landsstýrismaðurin heimild at nágreina, hvat er meta sum ein nøktandi eftirløn.

§ 1, nr. 2 í lógaruppskotinum hevur ikki eina slíka heimild, og skal Fíggjarmálaráðið tí heita á Fíggjarnevndin um í áliti sínum at skjóta upp, at uppskotið verður broytt sum omanfyri nevnt.

Tinganes, tann 8. februar 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður